LM-099/2023

Fylgiskjal 23

Annika Petersen

Fra: Rúni Kruse <krusarin@yahoo.com>
Sendt: 21. februar 2024 23:22
Til: VMR-Journal
Emne: Viðmerkingar til ferðavinnulógina
Vedhæftede filer: Viðmerkingar til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu.docx

Hey,

viðheft eru mínar viðmerkingar.

vh

Rúni Kruse
Hagastýrisformaður og bygdaráðslimur
Heinagerði 12
FO-435 Streymnes

LM-099/2023

Fylgiskjal 23

Viðmerkingar til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu.

§3. Her verður serliga hugsa um viðmerkingarnar. Her átti tað at framgingið betur, at talan ikki er um óavmarkaða atgongd til hagarnar. Men at tað bert meinast við, har tað í ferðavinnuætlanini er positivt nevnt, at ferðafólk kunnu fara. Og sjálvandi við at fylgja teimum treytum, sum annars eru nevndar í ferðavinnuætlanini.

§4, stk. 4. Hví skal tann sum hevur hund við sær uttan loyvi ikki revsast? Hetta burdi verði sett inn í § 16 um revsing.

§5. Skal hetta lesast sum, at handilslig ferðavinna bert kann gerast í samráð við eigara, og eigarin kann krevja pening fyri tað (soleiðis lesi eg tað, og eg meini at tað er tað rætta. Tað er ikki rímiligt, at 3. maður skal kunna tjena pengar uppá mína ogn, uttan at eg fái okkurt afturfyri) Um so er eigur tað, at verða nevnt antin í lógini ella í standaravtaluni. Um tað ikki er meiningin við hesi §, so taki eg als ikki undir við hesum.

§6. Lógin sigur at ferðavinnuætlanin skal verða liðug 01. juni 2025, meðan viðmerkingarnar siga 01. januar 2025. Uttan mun til havat er rætt, so er hetta tíðarskeiði alt ov stutt. Fyri Sunda kommunu, merki tað at vit skullu gera ætlan fyri 11 bygdir og 35-40 hagapartar. Tað eru tískil minst eini 50 fólk, sum skullu verða partur av hesum arbeiði. Eisini er endurgjaldið til kommununa alt ov lítið í mun til, hvussu stórt arbeiði liggur í hesum fyri kommununa.

Tað er eisini ov ógreitt, hvussu kommunan skal fyrihalda sær, um hagar/bygdir ikki eru áhugaði í at gera ferðavinnuætlanina. Hvat fyri heimild hevur kommunan? Er tað møguligt hjá eini bygd/haga, at gera eina ætlan, sum sigur at her skal eingin ferðavinna verða? Um ikki, hví?

§7. Hetta er kanska nemt at praktisera , har kommunan er ein bygd og fáir hagar. Men hjá Sunda kommunu, við 11 bygdum og 35-40 hagapørtum, er tað ómøguligt við eini lítlari nevnd. Tí mugu tað sum eg vísi á omanfyri verða minst eini 50 fólk, sum skulu verða partur av hesum. Tað verður øgiliga dýrt fyri kommununa.

§8 Sunda kommuna hevur í hvussu er 10 bygdagotur, har fleiri av hesum eru um kommunumark. Sum er nú, mangla peningur í fyri at viðlíkahalda hesar. Tískil skal eisini peningur til hetta, og heldur ikki her, verður lagt upp til, at kommunan far nokk av peningin til at rokja uppgávuna.

§13 Hetta gjaldi sum skotið verður upp, er alt ov lágt, í samband við allar uppgávurnar í verða álagdar kommununum at loysa.

§14 Hetta býti er alt ov torskilt. Fyri at gera skilagóðar viðmerkingar til hetta er brúk fyri, at vita meira um hvussu býtislykilin sær út.

§17 Her fara lógir úr gildi, sum í dag verða brúktar, og so kemur einki ístaðin fyri. Tað kann ikki verða rætt. Og gildiskoman er eisini alt ov brá. Tá tað dragar seg um ferðavinnu, so eru avtalur longu gjordar fyri minst eitt ár fram. Hetta kemur so at seta bæði teir Føroysku og útlendsku ferðasmiðirnar í ringt orð. Tí tað ferðin er seld uppá nú ikki longur er galdandi. Tað er í hvussu er ikki viðvirkandi til eina positiva mynd av Føroyum sum ferðavinnuland.